Gasolin´ The Movie

# – Stórlæti og fall





**Hetta er filmurin um danska orkestrið Gasolin´. Filmurin er søgan um eina rokklegendu í danskari rokksøgu. Við hesum filminum fáa vit fullu søguna, um hvussu orkestrið Gasolin´ varð sett á stovn. Hvussu teir øll árini, ið teir vóru saman, høvdu eitt stórt stríð um vald og tó megnaðu at halda saman á orkestrinum í nýggju ár.**

UMMÆLI
*Kim Simonsen*

Søgan um Gasolin´ er nógso klassisk um øll hesi stóru orkestrini, ið komu fram seinasti í 1960inum ella fyrsti í 1970inum, og gjørdust kend, men síðani duttu sundur innanifrá, tí tað vóru tveir sterkir persónar í orkestrinum. Sum øll vita, so er skapanarevni ikki nakað, ið altíð trívist í felag, ella er givið øllum demokratiskt. Í Pink Floyd vóru tað David Gilmour og Roger Waters, í The Beatles John Lennon og Paul McCartney og í Gasolin´ guitarspælarin Franz Beckerlee og sangarin Kim Larsen, ið vórur ósamdir um alt frá byrjan og tí kom orkestrið ikki at yvirliva so leingi.

### Á hvør sínari gongustjørnu

»Gasolin var bandet, der gav dansk rock en selvstændig, unik og uigennemskydelig identitet. Med humor, frækhed, varme, solidaritet og et poetisk flow satte gruppen ord og toner på de følelser, tanker, strømninger og sansninger, som dominerede den tid, den både var et produkt af og satte sit umiskendelige præg på.«
*Klaus Lynggaard, tónleikaskribentur og sangari.*

Tað er ikki fyrr enn hendan filmin, at vit koma at hoyra um, hvat veruliga hendi millum Kim Larsen og Franz Beckerlee hesi árini. Tað er ikki so lætt at síggi á gomlu upptøkunum, at hesir livdu í einum ævigum roki, í ósemju og stríð og trupulleikar vóru eina vanligur dagsordan handan tjaldið í bólkinum. Spurningurin er so, um hendan ósamjan skapti nakað gott fyri bólkin? Onkur sigur í filminum, at hetta var gott, tí hetta stríðið, var sum yin og yang í bólkinum. Hetta er helt ein eftirrationalisering, tí sum vit vita, so fór bólkurin í upploysn, og bert Kim Larsen kom víðari sum listamaður.

### Then we take USA

Gasolin gjørdust "heimskendir" í Danmark, og royndu síðani, at klára seg í USA, men hetta riggaði ikki.

Í filminum síggja vit eisini hvussu tíðin broyttist, frá 1960inum og einari glaðari ósekari optimismu til ein meiri ráan og politiskan veruleika í 1970inum.

Gasolin er altíð forbundið við eina livandi tíð í Keypmannahavn, serliga øki Christianshavn, har seinni Christiania sá dagsins ljós. Langt áðrenn Christiania, varð Christianshavn kent fyri at kunna rúma arbeiðsmonnum, lesandi, bohemum, sprittarum, sangarum og ikki minst Gasolin.

Í 1980inum varð hetta øki so fulkominliga broytt av yuppiementanini. Í dag er hetta øki eitt tað fínasta og dýrasta í Danmark.

### Jassarin Franz Beckerlee

Tað heilt serliga við Franz Beckerlee var, at hann í mun til Kim Larsen, altíð var ávirkaður av jassinum. Hann byrjaði sum barn at lurta eftir Louis Armstrong. Hann og vinurin Wili Jønsson.

Franz fekk seinni eina stóra framgongd sum saksofonistur í lívliga jassumhvørvinum í Keypmannahavn í sekstiárunum.

Sum tíðin gekk gjørdist Frantz alt meiri áhugaður í beattónleikinum og tá hoyrir Jimi Hendrix á Radio Luxembourg, og byrjar umaftur at spæla, hesuferð el-gittara.

### Popparin Kim Larsen

Søgan hjá Kim Larsen er ein heilt onnur. Hann kom frá einum meiri vanligum heimi í Norðurvesturbýarpartinum í Keypmannahavn. Hann hoyrdi sum yngri Rachel Rastenni og Little Richard og fór í gongd við eina útbúgving sum lærari. Hann endaði seinni á Sofiegården á Christianshavn, í lívliga »slumstormaraumhvørvinum«, tí hann einki stað hevði at búgva.

Kim var meir borgarligur, og vildi mest av øllum hava eini hús, arbeiði og ein MG bil í garasjuni. Hann var tó bert lærari nakrar fáar mánaðir, áðrenn hann keypti ein gittara og fór at spæla saman við Wili Jønsson, ið tá búði í økinum.

Wili var tá ein ordans fríur fuglur, ið livdi eina sorgleysa bohemetilveru í sekstiárunum, við ymiskum arbeiði, drøgg og við tónleikaarbeiði her og der.

### Gasolin fram um alt

»At vokse op til lyden af Gasolin' gav håb i en mørk tid samt ikke mindst næring til de drømme, der siden er gået det meste af et liv med at indfri. Som de bedste indenfor rock'n'roll skabte gruppen et særunivers, fuld af fortrøstning, energi, farver, alternativer, inspiration og herfra skal kun lyde: I styrer og vi skylder!«
*Klaus Lynggaard, tónleikaskribentur og sangari.*

Við eitt kom Frantz inn í hetta umhvørvið, og teir fóru at spæla saman. Kim fekk loyvi at syngja og Bjørn Uglebjerg spældi trummur, seinni varð hesin útskiftur við Søren Berlev.

Teir fóru at spæla sum svakir. Bæði Kim og Franz vóru um hetta skildir frá konunum. Einki skuldi støðga teimum. Annað enn, at Kim og Franz ikki vóru samdir um nakað. Franz hevur eina meiri fína tónlistarliga søgu aftanfyri seg um jasstónleikari, og hann respekterari ikki Kim, ið var ein rópmikil og glaðbur ungur maður. At byrja við fær Kim ikki loyvi at skriva sangir, men seinni, so gerðst Kim avgerðandi sum sangskrivari.

### Gasolin sum minnismentan

Sum øll onnur góð orkestur, so høvdu Gasolin´ stórar ambitiónir frá fyrsta degi. Sjálvt tá teir ikki kláraðu seg í USA, tordu teir at trúgva á, at alt var gjørligt.

Filmurin Gasolin´ er ein smittandi søga um ein part av danskari og helst eisini føroyskari minnismentan, um seksti- og sjeytiárini, um ungfólk, ið tordu at tríva eftir legendunum og skapa mytur, ið seinni hava skapt rokksøgu í Norðurlondum.

Hetta er ein søga, ið bæði er ein ballingarferð aftur í tíðina, men eisini ein nostalgisk ferð aftur til ein tíðaranda, ið nú er fulkominliga burtur og virkar uppá okkum, ið eru yngri, sum nakað eksotiskt og horvið.

Eg sat allantíðina og hugsaði um, hví hesin filmurin var gjørdur nú? Her var okkurt, ið minti meg um allar hesar røðirnar, har 60ini og 70ini verða sett fram, á ein heldur nostalgiskan hátt.

Danir sótu t.d. klistraðir til skíggjan tá „Krøniken" gekk, men er tað, tí tey hungra eftir samleika, samanhaldi og søguligum samanhangi? Menniskjað í dag sær út til at líða av strongd og vil tí ofta gerast heldur afturlítandi. Vit eru vorðin rastleys, og tað halda vit so er broyting, tí eru vit ov løtt offur fyri spegilsmyndum og tað er ein stórur marknaður fyri ævisøgum og søgum um næru fortíðina.

Sum projekt, so haldi eg, at filmurin Gasolin´ líðir undir einum ávísum huga móti at skapa eina samleikaskapandi og nostalgiska minnismentan, men filmurin er tó áhugaverdur.

4 stjørnur av 6.

★★★★

**Gasolin´**
*Leikstjóri Anders Østergaard. 92 minutir.*
*Framførdur í Havnar Bio frá fríggjadegnum 5. mai.*


# Havnar Bio




**Scary Movie 4**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | 03.05 | kl. 20.00 | kl. 22.00 |
| Hósdag | 04.05 | kl. 20.00 | kl. 22.00 |
| Fríggjadag | 05.05 | kl. 23.30 | |
| Leygardag | 06.05 | kl. 23.30 | |
| Sunnudag | 07.05 | kl. 22.45 | |




**Ice Age 2**

| | | |
|---|---|---|
| Mikudag | 03.05 | kl. 18.00 |
| Hósdag | 04.05 | kl. 18.00 |
| Fríggjadag | 05.05 | kl. 18.00 |
| Leygardag | 06.05 | kl. 18.00 |
| Sunnudag | 07.05 | kl. 17.30 |




**Firewall**

| | | |
|---|---|---|
| Mikudag | 03.05 | kl.19.30 |
| Hósdag | 04.05 | kl.19.30 |
| Fríggjadag | 05.05 | kl. 18.30 |
| Leygardag | 06.05 | kl. 18.30 |
| Sunnudag | 07.05 | kl. 18.00 |

SEINASTA SÝNING




**Så flyt dog**

| | | |
|---|---|---|
| Mikudag | 03.05 | kl.22.15 |
| Hósdag | 04.05 | kl.22.15 |

SEINASTA SÝNING

**KOMANDI FILMAR**




**Mission Impossible 3**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 05.05 | kl. 20.00 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 06.05 | kl. 20.00 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 07.05 | kl. 19.30 | kl. 22.15 |




**Gasolin** FRUMSÝNING

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 05.05 | kl. 21.00 |
| Leygardag | 06.05 | kl. 21.00 |
| Sunnudag | 07.05 | kl. 20.15 |

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**